# Endurnýggjan



Ósentimentalur tjóðskaparskalli

UMMÆLI
*Kinna Poulsen*



Í eina tíð hevur listamaðurin Hanni Bjartalíð als ikki málað. Í staðin hevur hann bygt smá modelhús, sum eru listarliga hugsað, men sum hann sjálvur sigur "um ikki annað altíð kunnu brúkast sum leikutoy hjá soninum". Tó at Hanni Bjartalíð fyllir 40 í ár, er tað helst at gera ov nógv av, at meta hansara málisteðg sum eitt úrslit av eini miðaldurskreppu. Men óansæð vísir núverandi framsýningin í Galerie Focus, at hann er aftur í málarínum í øllum góðum við endurnýggjaðum myndamáli.

## At minnast deyðan

Menniskjaskøltar hómast í mongum myndum frá barokktíðini, har teir lýsa í myrkrinum sum ein memento mori áminning um, at jarðarlívið er avmarkað, meðan ævinleikin er langur. Umráðandi er tessvegna at hava øll viðurskifti í ordan við Várharra, soleiðis, at ein kann doyggja í sælari vissu um at vera ein av teimum útvaldu, sum sleppur inn í Paradísið. Í nýggjari tíð hevur skølturin verið sera vælumtóktur innan poppmentanina, innan eitt nú teknirøðir og heavy metal tónleik og grundin til tess liggur helst í sterka og einfalda symbolvirðinum, sum skølturin hevur. Enski listamaðurin Damien Hirst (1965) tykist fullgreiður yvir hesar týdningar og hjátýdningar í verkinum "For the Love of God" (2007), sum er ein avstoyping av mannaskølti í fullari støðd úr hvítagulli, ið er steinsettur við 8601 lýtaleysum diamantum. Verkið samskiftir við fortíð og nútíð við, at tað bæði er eitt siðbundið memento mori, samstundis sum tað í sínum vulgera, kostnaðarmikla vakurleika er ein popput sensatión. Skøltarnir hjá Hanna Bjartalíð í Galerie Focus tykjast hvørki moralskir ella sentimentalir, heldur má sigast, at onkur teirra hevur eitt heldur enn ikki gemytligt yvirbrá.

## Grunnur, glaður skalli

Skallamyndin, sum er nummar 28 í myndaskránni, er serliga áhugaverd. Allir skøltar síggja út til at grína, men hetta smílið sýnist veruliga útspekulerað. Eygnaholurnar, sum vanliga eru djúpar, myrkar og tómar, minna í hesum førinum mest um eitt par av ræðuliga smartum sólbrillum. Men mest av øllum eru tað litir, formar og bygnaður, ið gera myndina áhugaverda. Skallin er settur mitt á, eitt sindur ovaliga á løriftið oman á eina stríputa grund, sum úr erva er ljósagrøn, gul og blá. Skølturin sjálvur er reyður og hvítur við eitt sindur av gráum og brúnum. Sjálvt skapið av skøltinum er undirstrikað av eini tjúkkari svartari umhvarvsstriku. Litirnir, sum tú nokkso skjótt varnast, tykjast liggja í forgrundini og mynda eina litsamanseting, sum tú kennir aftur: reytt, blátt og hvítt. Tilsipingin til Merkið tykist herliga undirspæld sum um litir og myndevni eru vald eitt sindur av tilvild og tí skallaskapið er grafiskt vakurt og litirnir áhugaverdir.

## Endurnýggjan

Á framsýningini eru tvær tvímyndir (diptykon), sum umboða nakað nýtt bæði í verki Hanna Bjartalíðs og í føroyskari myndlist sum heild. Myndevnið er áðurnevndu modelhús, sum Hanni Bjartalíð límar og setir saman. Myndirnar eru heilt øðrvísi enn tað, vit higartil hava sæð frá Bjartalíð, sum ofta hevur havt livandi verur sum myndevni. Arkitekturur hevur verið at sæð í onkrum av hansara myndum, men mest sum innirúm, ið hava verið karmur kring menniskju og



Ein av teimum øðrvísi og sera spennandi tvímyndunum á framsýningini